FAKTA

Lad de små børn

Danmark, 2004, 104 min.
Havnar Bio, Bio 2, 16.30
Týsdagin 10. august - hósdagin 12 august.

Latum børnini

UMMÆLI
Kim Simonsen

Paprika Steen kenna vit sum ein dugnaligan sjónleikara í filmum sum »Festen«, »Den eneste ene«, og fleiri ferð um árið síggja vit hana spæla við í onkrum nýggjum donskum filmi. Paprika Steen er sjálv ein stórur filmelskari, og nú hevur hon nú gjørt sín fyrsta film »Lad de små børn«. Leikritið er skrivað av kenda Kim Fupz Aakeson (Den eneste ene, Okay, Forbrydelser). Sjálv hevur hon spælt í filmum hjá Lars von Trier, Thomas Vinterberg og Susanne Bier. Paprika Steen er við í nýggju bylgjuni innan danskan film.

Við í filminum hjá Paprika Steen eru kendir leikarar sum Søren Pilmark, Sofie Gråbøl, Karen-Lise Mynster og svenska Lene Endre. Vit síggja ofta hesi fólk í donskum skemtifilmum, men »Lad de små børn« er eingin skemtifilmur. Pilmark kenna vit frá m.a. »Riget«, »Blinkenede lygter«, »Rembrandt« og »De skrigende halse«. Sofie Gråbøl spældi Tove Ditlevsen í »Barndommens Gade«, »De skrigende halse«, »Den eneste ene«, seinast er hon kend frá »Nicolaj og Julie«. Karen-Lise Mynster kenna vit frá Matador, sum bankadaman, ið gjørdist við barn við tí fína og snobbuta Direktør Varnes. Seinni hevur hin havt eina rættiliga stóra framgongd sum sjónleikari og sangari. Hon gjørdi fyri nøkrum árum síðani ein einamanssangleik um Tove Ditlevsen, ið var sera væl fagnaður.

Paprika Steen hevur fingið alt upp í hendurnar, góðar leikarar skrivað av einum av gulldreingjunum innan film í Danmark, men sætt at siga er hon ein dugnaligari sjónleikari enn leikstjóri. »Lad de små børn« viðger eitt sera tungt evni og er ein toluliga góður filmur, men einki meistaraverk.

Eftir vanlukkuna

Temaið, ið hesin filmurin viðger, hvussu foreldrini koma viðari í lívinum, tá tey hava mist eitt barn. Húsameklarin Annette (Karen-Lise Mynster) er farin at drekka nakað illa, eftir at hon kom at koyra á gentuna, men hon hevði onga skyld í vanlukkuni. Gentan var dóttir arkitektin Claes (Michael Birkkjær) og Britt (Sofie Gråbøl). Claes syrgir so ógvusligt, at arbeiðið sum arkitektur gevir onga meining fyri longur. Hann skeldast ofta við kundarnar. At enda biður vinurin og stjórin hjá honum Niels hann um at fara í orlov. Claes tímir enn ikki at siga konuni frá, hvussu ringt hann hevur tað. Hann er farin at briksla henni, at hon hevur tað so gott sum hon hevur tað. Konan hjá Claes viðger sorgina á ein annan máta, hon er sosialráðgevi og fær ein alt ov stóran stóran áhuga í ungari einligari mammu og barninum hjá henni.

Tá sorgin sorar lívið

Fyri Claes fyllir sorgin alt. Hann heldur við eitt øll verða grunn og tápulig. Alt melur seg um sorgina, og hann dugir ikki at liva longur, tí hann er bittur og óður inn á sjálvt lívið. Serliga týðuligt kemur hetta fram í mun til vinin Niels og konuna hjá honum, ið eru eydnurík. Niels dugir hin vegin heldur ikki at tosa við Claes, hetta skapar eina stóra kreppu í vinarlaginum. Júst hetta er sera realistiskt, tí tað eru ikki nógv fólk, ið megna at rúma óendaliga sorg og ikki nógv duga at hjálpa øðrum á lívsins royndarstundum. Eitt er vist, at Claes gerst aldrin hin sami aftur. Konan Britt er á ein máta sterkari, hon vil hava eitt annað barn við Claes, men hann livir í einari aðrari verð.

Hetta er stundum ein álvarsligur filmur, ið at enda snýr seg um eitt kærleiksviðurskifti millum tvey, ið syrgja eitt oyðileggjandi tap, men kemur teirra hjúnarband at tola hetta? Megna tey at bróta einsemið, ið ofta trívist, sjálvt um fólk eru gift. Duga tey at tosa saman um hvat er hent?

Filmurin minnir um »Elsker dig for evigt« og hevur sama tematik, sum filmir eftir Pedro Aldomóar, men er langt frá so góður. Eg hugsaði eisini mangan um Bergmann og filmir sum »Scener fra et ægteskab«, munurin var tó, at hesi fólkini tosa ikki so nógv sum Liv Ullmann og Erland Josephson. Her hava vit tað perfekta hjúnarlagið, við eitt er alt sorlað sundur. Hetta kann minna okkum um at stutt er millum lukku og sorg, kærleika og beiskleika. Kinverjar hava sama tekn fyri kreppur sum fyri menning. Sjálvandi er tað ongantíð mennandi at missa eitt barn, men onkunsvegna er neyðugt at læra at liva víðari. Lívið er fylt við kreppum, stórum og smáum. Ein klókur maður segði, at tað eru okkara evni at takla kreppur, ið avger, hvussu lív okkara eydnast í longdini. Tað ringasta lagnan ein persónur, ið hevur mist eitt arbeiði ella hvørs giftarmál er farið í søguna, kann fáa, er at sita fastur í beiskleikanum, í sjálvmiskunn og nostalgi.

Kreppur endurføða okkum sum nøkur onnur enn tey vit vóru einaferð, ella hildu okkum vera. Summi verða kálvfødd og koma bert hálv gjøgnum stórar broytingar í lívinum. Kinverjar siga, at tað broytingarvindar blæsa, er tað fólk, ið byggja skýli og onnur byggja vindmyllur. Tá stórir sorgarleikir henda okkara næsta, ella okkum sjálvum, skulu vit hjálpa teimum og okkum sjálvum. Tað ringasta vit gera er, sum Niels og konan, at royna at lata sum um einki er hent.

Maersk Air:

Skipanin er ov stirvin

Tíðin er farin frá samstarvinum millum Maersk Air og Føroyarutunum.

Føroyarutan riggar ikki saman við broytta virkisháttinum hjá Maersk Air. Sølu- og marknaðarleiðarin sær lítið í vegin fyri, at eitt annað flogfelag byrjar at flúgva til Føroya

FLOGFERÐSLA
Hans Kárason Mikkelsen & Heri á Rógvi

Sum tað stóð at lesa í Sosialinum leygardagin, so er arbeiðið at frígera prísásetingina á Føroya-rutunum sett í verk. Tað verður tó valla í morgin, at føroyingar fara at uppliva ein kollveltandi politikk á flogferðsluøkinum. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í loftferðslumálum, metir, at tað fara at ganga eini tvey ár, áðrenn ætlanin verður veruleiki.

Anna Von Glasow, sølu- og marknaðarleiðari hjá Maersk Air, fjalir ikki útyvir, at stirvna skipanin við prísásetingum á Føroya-rutunum spælir ein stóran, og kanska avgerandi, leiklut í sambandi við avgerðina at gevast at flúgva til Føroya.

- Við verandi skipan ganga tretivu dagar hvørja ferð, vit ætlað at broyta prísin til vit fáa loyvi. Við okkara nýggja bíleggingarhátti riggar hetta ógvuliga illa, sigur Anna Von Glasow.

Hon kann ikki svara fyri vist, um Maersk Air hevði valt at verið verandi um so var, at prísásetingin í Føroyum var sum í ES-londunum, har tað er frítt at áseta prísin frá degi til dags.

Í juni varð Vinnumálaráðið kunnað um eina umsókn, ið danski myndugleikin á økinum, Trafikministeriet, hevði fingið um at loyva flótandi prísáseting í Føroyum. Tað vildi merkt, at flogfeløgini av sínum eintingum kunna bjóða dýrari og bíligari ferðaseðlar - uttan at venda sær til myndugleikarnar áðrenn. Hendan umsóknin vildi fingið viðmæli frá Vinnumálaráðnum, men hon var ikki liðug viðgjørd, tá Maersk-Air almannakunngjørdi, at felagið gavst at flúgva til Føroya.

Maersk Air nýtir á øðrum rutum eina skipan, tey rópa fyri "Fly as you like", har prísirnir eru ymiskir alt eftir nær tú bíleggur, og hvussu nógv pláss í flogfarinum, tær tørvar.

Tað hevur ljóðað, at Maersk Air hevur sent eina umsókn um nýta sama konsept á Føroya-rutunum sum á øðrum rutum hjá flogfelagnum, men eingin tílík umsókn er send.

- Tað nyttar einki at senda eina tílíka umsókn, tá ið vit framvegis skulu søkja hvørja ferð, vit ynskja at broyta prísin, sigur Anna Von Glasow.

Ber til hjá øðrum

Við drúgvu royndunum, ið Maersk-Air hevur gjørt sær í Føroyum, og sterku støðuni hjá Atlantic Airways millum Føroyar, kann tað lættliga tykjast trupult hjá øðrum flogfeløgum at royna seg á Føroya-rutunum. Men Anna Von Glasow heldur tað vera góðar møguleikar fyri, at eitt annað flogfelag fær áhuga fyri at royna seg á Føroya-rutunum.

- Tað krevur sjálvandi nakrar serligar flúgvarar og vitan. Men tað eiga onnur flogfeløg eisini, og eg kann lættliga ímynda mær, at onnur flogfeløg vildi havt áhuga fyri Føroyum, sigur Anna Von Glasow.

Tann "stutta" flogbreytin í Vágum hevur eisini spælt ein lítlan leiklut í avgerðini, tá ið tað ikki riggar so væl hjá Maersk Air at lenda við teirra større flogførum í Føroyum.

- Tað er altíð trupult, tá flogbreytin er stutt sum tann í Føroyum. Tað er ein figgjarligur spurningur fyri eitt flogfelag, tá tú bert kann nýta eitt ella nøkur fá sløg av flogførum at flúgva við, sigur Anna Von Glasow.

Heldur til Føroya enn til Norra

Tað var bíligari hjá einum norskum skótaliði at fara til Føroya enn at ferðast í egnum landi. Og tað angraðu tey ikki

FERÐING
Heri á Rógvi,
heri@sosialurin.fo

Øvstun Speidergruppe úr Bergen kundi í ár halda 50 ára stovningardagur. Hetta skal sum vera man hátíðarhaldast. Norsku skótarnir gjørdu av, at hátíðarhaldið skuldi vera ein ferð til Føroya. Tað var bíligari fyri tey at fara til Føroya enn at fara eystur Noreg. Ein av orsøkunum er bólkaavslátturin við Norrønu. Eisini er væl bíligari at keypa matvørur í Føroyum.

Norska skótaliðið taldi 33 skótar. Frá 10 til 25 ár. Steðgurin gjørdist frá mikudag til sunnudag, men tey vóru heilt ótrúliga væl nøgd við allan túrin. Ikki minst vóru tey heppin við veðrinum.

Til Eiðis og Selatrað

Skótarnir úr Bergen komu á Havnina ólavsøkuaftan við Norrønu og fóru avstað mánamorgun við Norrønu. Tey búðu á Skótadeplinum á Selatrað. Ólavsøkuaftan vóru tey í Havn; ólavsøkumorgun við bátunum hjá Palla Lamhauge til Eiðis og so síðani til Gjáar og Funnings og aftur á Selatrað við Kjartan Dalsgaard sum ferðaleiðara.

Fríggjadagin og leygardagin nýttu tey til skótalegu. Tey vóru á floti við bátum av Seðlatrað og grillaðu fongin um kvøldið.

Sunnumorgunin var farið í kirkju á Selatrað, har deknurin las lestur á donskum.

Skótaliðið úr Bergen letur heilsa øllum teimum nógvum hjálpsomu fólkunum, tey hittu í Føroyum.

TILBOÐ
so leingi vøra er á goymslu

GOSBAÐ
• Við 10 jetdysum og frontpanel. Uttan armatur
• Veitingartíð 4-6 vikur
vanligur prísur 11.498,-
BERT 9.598,-
spar 1.900,-

BAÐIRÚMSMØBIL
• Hvítt, 88 cm
• Undirskáp H:55xB:60,5xD:31,5 v/ 2 hurðum, hvítt vask, spegl og baldakin
• Háskáp H:172xB:27,5xD:28 v/ 2 hurðum
• Uttan blandingsbattarí
BERT 2.298,-

BAÐIRÚMSMØBIL
• Undirskáp H:62xB:90xD:34 v/ vaski í høgru síðu, skuffa og 3 hurðar við handtøkum
• Yvirskáp við glashurð og 2 glashillum, spegl, hill og ljós
• Uttan blandingsbattarí
BERT 3.498,-



VALNØT BORÐPLÁTA
• Massiv borðpláta. 62x302 cm
BERT 1.198,-

damor
KVÍGGJARTÚN 3 • ARGIR • TEL 315415 • FAX 319001